# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# Óli Breckmann 60 ár



Sunnudagin 30. mars fylti Óli Breckmann 60 ár. Óli varð valdur á ting 7. november í 1974, og hann var í meiri enn 33 ár markantur tingmaður og tikin úr leikum sum røðari, ið bæði undirhelt og undirbygdi.

Óli er havnarmaður. Pápin, Ludvig Breckmann (1921-1974) vaks upp á krossinum millum Hoyvíksvegin og Jónas Broncksgøtu, og har búsettist hann saman við konuni Astrið (1929-2002), sum var ættað úr Vestmanna. Foreldur hennara vóru Gunnar Dahl-Olsen, sýslumaður, og Jóhanna. Tey vóru bæði úr Vági.

Astrið og Ludvig fingu seks børn: Óli (1948), Mai (1949), Hanna (1953-1999), Birna (1957), Gunnar (1963) og Páll (1967).

Óli dugir ógvuliga væl at fortelja og taka til. Hann kennir seg sum rættan havnarmann og hevur so mangan víst á, at forfedrar hansara vóru havnarmenn í fyrstu fólkateljingini í 1801, og at tippoldurabbin var soldatur á Skansanum, tá ið Brillumaðurin tók hann í 1808!

Í 1967 leyk Óli málsligt studentsprógv í Hoydølum. Hann fór beinanvegin undir lestur í Bretlandi, har hann mundi vera fyrsti føroyski studenturin. Óli las enskt mál í Edinburgh og samfelagsfrøði í Bristol. Í 1974 var hann liðugur við lesturin, og tá varð hann settur í starv í Hoydølum.

Læraratíðin gjørdist ikki so long. Beinanvegin, eftir at hann var komin heim aftur, fór Óli at skriva í Dagblaðnum. 7. november í 1974 varð hann valdur á ting fyri Fólkaflokkin í Suðurstreymoy, og harvið var sjótil settur á politiska lívið, sum í skrift og talu varð livað, inntil Óli fall á løgtingsvalinum 19. januar í ár.

Fremsta amboðið hjá Óla í politiska andglettinum var Dagblaðið. Pennurin var lættur, skemtiligur, sarkastiskur og óvanliga spískur. Tað loysti seg fyri undirtøkuna hjá Óla og Dagblaðnum, at tað hjá lesarunum bar illa til at sleppa undan at taka støðu til Dagblaðið og Óla – uttanfloks og eisini innanfloks.

Skatturin, lønarlagið og Milton Friedman, NATO, friðarrørslan, kalda kríggið og Reagan og Tatcher, kvinnurørslan og konservativ familjuvirði vóru millum favoritttilfarið í Dagblaðnum. Í 1984 varð Óli valdur í fólkatingið, og tá gjørdi hann upp við fólkafloksleiklutin, sum hevði verið ikki at blanda seg ov nógv upp í politiska lívið á flatlondum. Óli stuðlaði við lív og sál borgarligu stjórnina hjá Poul Schlüter, og hann dugdi væl at nýta talarapallin á Christiansborg soleiðis, at tað varð umrøtt í donsku pressuni og harvið eisini í Føroyum.

Persónlig bond vórðu knýtt við fremstu borgarligu politikararnar í Danmark, og tað hevði ivaleyst sín týdning. Tiltikin er leikluturin hjá Óla, tá ið lóggivið varð um TV2, og í 1998 varð tað nógv umrøtt, tá ið Óli gav Nyrup lyfti um, at hann skuldi ikki atkvøða ímóti pinsapakkanum, um Nyrup syrgdi fyri góðari bankaavtalu.

Í 2001 varð Óli ikki valdur aftur í fólkatingið. Sum formaður í tingbólkinum hevði hann framvegis stóran leiklut, og hóast hann ongantíð gjørdist landsstýrismaður, so dugdi hann sum fáur politiska handverkið aftanfyri tjaldið at toga í træðrirnar.

Eftirtíðin vísti, at tá ið fólkatingssessurin glapp, var politiski toppurin náddur. Tá vóru longu fleiri ár síðani, at Óli var givin at skriva so nógv í Dagblaðnum, sum hann áður hevði gjørt, og politiska minnið hjá veljaranum er ikki so langt. Óli hevur fleiri ferðir tikið til, at tú verður ikki valdur fyri tað, sum tú hevur verið við til at útinna, men fyri tað, sum tú lovar at gera.

Undir fullveldissamgonguni hevði Óli eitt skifti stóran leiklut sum formaður í fíggjarnevndini, og seinasta valskeiðið var hann næstformaður í tinginum og framvegis ógvuliga loyalur samgongutingmaður.

Óli arbeiðir skjótt, og undan lætta penninum eru fleiri bøkur komnar: Eitt nú Stavnurin, sum tað varð nógv tosað og skrivað um, endurminningar um bæði Hans Paula Johannesen og Eiler Jacobsen og ein bók um skatt.

Ein stórur saknur hevur tað verið, at føroyskir politikarar ikki hava skrivað politiskar endurminningar. Hesa óhepnu traditión fer Óli heilt víst at gera upp við, um hann hevur lív og heilsuna.

Óli er giftur Birnu, fødd Midjord og ættað av Argjum. Tey búgva á Hamrinum á Argjum. Børnini hjá Birnu og Óla eru Astrið (1982), Ludvík (1985), Pætur (1988), Mona (1991) og Bjørk (1993). Eisini eigur Óli Sissal Kampmann í Vestmanna, sum er fødd í 1974.

60 ára føðingardagin var Óli Breckmann burturstaddur.

J

---

†

## Andlát og jarðarferðir

**Jonny Joensen**, fyrrverandi fyristøðukvinna á Hotel Tórshavn, andaðist í Keypmannahavn leygardagin, 67 ára gomul. Bønarhald verður á Håndværkerhaven 49, Bispebjerg, týsdagin kl. 11. Jarðarferðin verður úr Hósvíkar kirkju mikudagin kl. 14. Tey, ið vilja minnast Jonny, kunnu lata Hósvíkar kirkju eina gávu, konta í peningastovnunum.

Kistan við **Marjun Heimá** fer av Lágargarði týsdagin kl. 18. Jarðarferðin verður úr Kirkjugarðskapellinum mikudagin kl. 14. Tey, ið milja minnast Marjun, kunnu lata Zarepta eina gávu, konta í peningastovni.

**Mads Kristoffer Poulsen í Skopun** andaðist á Røktarheiminum Áargarði á Sandi fríggjadagin, 92 ára gamal. Jarðaferðin verður úr Skopunar kirkju týsdagin klokkan 14. Sungið verður úr sálmabókini. Tey, ið vilja minnast Kristoffer, kunnu lata Skopunar kirkju eina peningagávu, konta í Føroya Banka.

**Sigurd Jacobsen**, ættaður av Slættanesi, búsitandi í Vestmanna, andaðist á Landssjúkrshúsinum leygardagin, 77 ára gamal. Jarðarferðin verður týsdagin klokkan 13. Tey, ið vilja minnast Sigurd kunnu lata Missiónhúsinum í Vestmanna ein gávu, konta í Eik.

**Brynhild Johannessen**, ættað úr Nólsoy, búsitandi í Tórshavn, andaðist á Lágargarði fríggjadagin, 87 ára gomul. Bønarhald verður á Lágargarði mánadagin kl. 18. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni týsdagin kl.13.

Kistan við **Sjúrður Hentze í Hovi** fer úr kapellinum á Suðuroyar sjúkrahúsi týsdagin klokkan 17. Jarðarferðin verður úr Hovs kirkju mikudagin klokkan 13. Sungið verður úr sálmabókini. Tey, ið vilja minanst Sjúrð kunnu lata eina gávu til Hovs kirkju. Konta í Suðuroyar Sparikassa.

**Dagurin**

**2. apríl. Teodosius**. Kann vera navnið á rómverska keisaranum Teodosiusi Stóra, sum doyði í 395. Men teir halda, at líka skjótt hevur dagurin navn eftir kristnari gentu Teodosiu, sum varð tikin av døgum umleið ár 300. Viðhvørt verður hesin dagurin róptur Teodorius. Nikolai Mohr doyði hendan dagin í 1790

---

# Allan Conrad vitjar í Føroyum

Frá 7. til 21. apríl vitjar danski Tanzania-trúboðarin Allan Conrad í Føroyum.

Ein skrá er gjørd fyri vitjanina hjá Allan Conrad, sum fer at vitja í nógvum ymiskum samkomum kring landið.

Allan Conrad arbeiðir sum trúboðari og byggir flogbreytir fyri Mission Aviation Fellowship (MAF) i Tanzania. MAF er ein stor altjóða tvørkirkjulig trúboðaraorganisatión við deildum um allan heim.

Allan er føddur í Kina av donskum foreldrum, sum eisini vóru trúboðarar. Tíðin í Kina vardi ikki leingi, tí familjan varð noydd at flýggja orsakað av borgarakríggi. Seinni fóru tey til Tanzania sum trúboðarar.

Seinni fekk Allan sær útbúgving sum elektrikari í Danmark, og hevur hann arbeitt í nógvum ymiskum londum. Men tað varð í Tanzania, hann vildi arbeiða sum trúboðari. Allan sigur, at hann altíð hevur havt eitt hjarta fyri afrikanarum.

Rúni Højgaard, flogskipari, búsitandi í Hoyvík, er umboðsmaður fyri MAF í Føroyum.



*Allan Conrad vitjar í Føroyum frá 7. til 21. apríl*